LM-104/2020

fylgiskjal 3

Hoyringsskriv frá Føroya Fuglafrøðifelag um mál nr. 20/02788: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. (Heimild at skjóta grágás)

Viðvíkjandi skjóting av grágás í 2021

Orsakað av sera avmarkaðari vitan um stødd, støðu og atburð hjá føroyska grágásastovninum mælir Føroya Fuglafrøðifelag (Fuglafrøðifelagið) staðiliga frá at samtykkja broytingaruppskotið í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., ið gevur umsitarum av veltum lendi møguleika at søkja um loyvi at skjóta grágás. Uppskotið leggur í ávísan mun upp til at fremja "kanningar og vísindaligar teljingar av grágás", men fyri at tryggja burðardygd eiga slíkar kanningar at vera gjørdar, áðrenn skjóting verður loyvd. Við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m., sum fór úr gildi 1. juni 2020, stílaði landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum í 2017 fyri at gera eina teljing av føroyska grágásastovninum. Teljingin varð áløgd Havstovuni at fremja, men orsaka av ov seinari og lítlari fígging gav teljingin ikki úrslit, sum kundu nýtast til at meta um føroyska grágásastovnin (Danielsen og Hansen 2020).

Væntandi vitanin um stovnsstødd og -gongd hjá grágás ger, at ongin skjóting av grágás í verandi løtu kann roknast sum burðardygg og tí heldur ikki verandi í samsvar við Bonn-sáttmálan ella AEWA- og CBD-avtalurnar, sum Føroyar hava tikið undir við. Í almennu viðmerkingunum kapittul 1.1. verður staðfest, at "grágásin skal framvegis kunna nørast í landinum", men tá skjótingin ikki kann metast sum burðardygg, er hetta í veruleikanum í andsøgn við uppskotið sjálvt.

Nevnast skal aftrat, at føroyska grágásin varð oydd av mannahond miðskeiðis í 19. øld, og ein stovnur hevur síðani ment seg aftur í Føroyum seinastu hálvu øldina. Hendan søguliga vanrøkt av einum av landsins fuglastovnum eigur at liggja fremst í tonkunum, tá tosað verður um at taka av fuglastovnum til fyrimuns fyri menniskjavirksemi.

Ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið

Viðv. § 17, stk. 3:
Sambært § 17, stk. 3 kann søkjast um loyvi at skjóta grágás "um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av grágásini".
Tað verður í viðmerkingunum kapittul 1, 2 og 3 nevnt, at vinnan er fyri fíggjarligan miss orsaka av, at grágás etur gras av veltum lendi. Ein ítøkilig kanning varð gjørd av Búnaðarstovuni í 2013, har roynt var at máta ávirkanina av grágás á grasvøkstur í bøi (Djurhuus 2013), men Fuglafrøðifelagið metir, at kanningin er ov avmarkað til at liggja sum grundarlag undir einari greiðari niðurstøðu um ávirkan. Haraftrat finst ikki nøkur frágreiðing, sum vísur á, hvussu

stórur fíggjarligi missurin er hjá búnaðarvinnuni orsakað av grágás. Tí er trupult at fáa fatan av, hvussu stórur trupulleikin er, og um hann í veruleikanum rættvísgerð ikki-burðardygga skjóting av einum fuglastovni.
Fuglafrøðifelagið metir, at tað í løgtingslógini meira ítøkiliga eigur at vera ásett, hvussu trupulleikar av grágás skulu grundast.

Viðv. § 17, stk. 4:
Sambært § 17, stk. 4 verður ásett í loyvinum neyvaru treytirnar fyri at skjóta grágás.
Fuglafrøðifelagið metir, at um grágásaskjóting skal loyvast, so eiga tað í løgtingslógini at vera ásettar neyvari treytir fyri loyvið at skjóta grágás. Hesar treytir eiga at innibera:

Hægstamark fyri talinum av grágæs, sum kunnu skjótast

- Í viðmerkingunum kapittul 1.1. stendur, at "[g]rágásastovnurin er ikki taldur, men Búnaðarstovan metir kortini, at loyvt kann vera at skjóta grágás, ið ger skaða á lendið." Eisini stendur í kapittul 2.4, at "Búnaðarstovan fylgir við, hvussu nógv grágás verður skotin, og neyðug stig verða tikin, um vandi er fyri stovninum." Tað er tó onki, sum bendir á, at Búnaðarstovan ella nakar annar stovnur hevur førleika til at gera hesar metingar. Tí eigur eitt hægstamark at verða sett fyri, hvussu stórt tal av gásum kunnu skjótast fyri t.d. hvønn m^2 av lendi. Hægstamarkið eigur at grundast í mest konservativu metingunum hjá serfrøðini um, hvat føroyski grágásastovnurin tolir.

Neyvt tíðarskeið fyri, nær ikki er loyvt at skjóta grágás

- Í viðmerkingunum kapittul 1.1. stendur, at tað "er ikki loyvt at skjóta grágás, meðan hon bølir á eggum og hevur ungar", men hetta verður ikki nevnt í sjálvum lógaruppskotinum. Tað er ónøktandi, og skal neyvt tíðarskeið ásetast í lógini fyri, nær ikki er loyvt at skjóta grágás. Tíðarskeiðið skal grundast á tøka vitan um reiðring hjá grágás í Føroyum, og eigur at byrja væl undan verping og enda, tá ungarnir eru vorðnir sjálvstøðugir.

Fráboðan og upplýsing

- Tann, ið skjýtur grágás, skal boða avvarandi myndugleikum frá hvørja ferð grágás verður skotin, og upplýsa nær og hvar hon er skotin.

Kunning um loyvistreytir skal innibera upplýsingar um gásasløg

- Landsstýrismaðurin skal lata upplýsingartilfar saman við skjótiloyvi, ið umframt treytum greiðir frá teimum ymsu gásasløgunum, ið líkjast grágás, men sum eru friðaði; av teimum, sum kunnu fyrikoma í Føroyum, kunnu nevnast íslandsgás, ekrugás, frostmýrugás, dvørggás og bæði grønlendsk og russisk korngás.

Afturat ásettum treytum hevur tað stóran týdning at tryggja eftir besta førimuni, at skjótiloyvi bert verður givið teimum, ið hava førleika til at skjóta drepandi skot. Grundað á eygleiðingar hjá limum Fuglafrøðifelagsins er tað ikki óvanligt at koma framá lamskotnar grágæs í Føroyum, og slíkt eigur ikki at koma fyri.
Eisini viðmælir Fuglafrøðifelagið landsstýrismanninum at fáa umstøður í lag soleiðis, at eitt lógarkrav kann setast til tann, ið skjýtur grágás, um at lata allar skotnar fuglar inn til viðkomandi myndugleika. Á tann hátt kunnu skotnu gæsnar eftirkannast og hareftir fáa almannagagnligt virðið sum m.a. granskingar- og undirvísingarlutir.

Viðv. § 17, stk. 6:
Sambært § 17, stk. 6 stílar landsstýrismaðurin fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar verða framdar. Her skjýtur Fuglafrøðifelagið upp eina meira bindandi orðing: "Landsstýrismaðurin skal stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar verða framdar."
Ov sein og lítil játtan hevur elvt til, at undanfarnar teljingar av grágas vórðu darvaðar og framleiddu vánalig úrslit. Tí er av alstórum týdningi, at nóg stór játtan verður latin rættstundis til slíka teljing í framtíðini.
At enda skal sigast, at § 17, stk. 6 eftir Fuglafrøðifelagsins tykki eigur at vera ein grein í sær sjálvum í Fuglaveiðulógini og eigur at vera galdandi fyri allan fugl, ið verður veiddur ella avtikin.

Heimildir

Danielsen, J., and L. J. Hansen. 2020. *Kanning av føroyska grágásastovninum.* hav.fo/PDF/gasteljing.pdf
Djurhuus, R. 2013. *Ávirkan av grágás á grasvøkstur í bønum.* http://www.bunadarstovan.fo/Admin/Public/DWSDownload.aspx?File=%2fFiles%2fFiler%2fBunadarstovan%2fGr%c3%a1g%c3%a6s+mars+2014.pdf

Við fuglakvøðum,

Jón Aldará, hin 26. januar 2021
vegna Føroya Fuglafrøðifelag